


# NÆMINGUR

## Innkeyp, tolling og goymsla

Ert tú virkin, ágrýtin, fyrikomandi og hevur hægri handilsskúlaprógv? So ert tú kanska tann heilt rætti/rætta at byrja sum skrivstovunæmingur á okkara innkeyps-, toll- og goymsludeild.

Um hetta hevur vakt tín áhuga, send eina skrivliga umsókn við møguligum váttanum/prógvum til P/f Poul Michelsen, Hoyvíksvegur 74, Postrúm 200, Fo-110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 1. Juni 2009. Ætlanin er at tú byrjar skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Um tú hevur spurningar vinarliga vend tær til Súsannu Simonsen millum 08.00 – 12.00 á tlf. 35 46 50

**P/f Poul Michelsen**

P/f Poul Michelsen ella bara PM, sum heilsølan ofta verður nevnd millum manna, varð stovnað í 1974. PM er í dag førandi heilsøla innan sítt virkisøki og hevur kundar kring alt landið og virksemið er í støðugum vøkstri. Hjá PM starvast íalt 50 fólk.


# Forvitnisligur danir í Oynni



**Í dag, hósdagin 14. mai, letur listaframsýning upp í listaskálanum, Oynni, á Tvøroyri**

Tað eru tey bæði donsku listafólkini, Rita Gram og Frits Bo Pedersen, sum hava listaframsýning í listaskálanum, Oynni, á Tvøroyri og tey vera bæði til staðar, tá ið framsýningin letur upp klokkan 17 í dag, hósdagin.

Rita Gram er fjølbroytt listafólk, tí umframt at fáast við myndlist, er hon eisini sniðgevari og í Oynni vísir hon fram vovin verk og tekningar, sum øll hava felags heitið: Fýrkantar í rúminum.

Frits Bro Pedersen undirvísir á listaskúlanum í Århus og hann vísir fram vatnlitsmyndir, sum hava felagsheitið: Kvinnan.

Framsýningin er opin í tríggjar vikur og hvønn dag er opið frá klokkan 14 til 18.




Hvussu tryggja nýskapan og menning, eisini í krepputíðum?

Spennandi workshop á Hotel Føroyum, tann 19. mai 2009 kl. 9-16.

Atlanticon (www.atlanticon.fo) og GEMBA Innovation (www.gemba.dk) bjóða tykkum til eina spennandi workshop um, hvussu vit tryggja nýskapan og menning í okkara arbeiði, eisini í krepputíðum.

Workshoppin er ætlað stjórum, leiðarum og øllum teimum, sum vilja vita meira um nýskapan.

Á workshoppini hava ráðgevarnir Søren Keilgast og Tomas Vedsmand frá ráðgevingarfyritøkuni GEMBA Innovation framløgur og undirvísing innan nýskapan.

Harumframt fasiliterar Janet Fríða Johannesen, ráðgevi hjá Atlanticon á workshoppini.

Prísur: kr. 1.500,- pr. luttakara.

Tilmelding og fleiri upplýsingar á t-post adressu: atlanticon@atlanticon.fo ella ring til Atlanticon á tlf. : 319685 ella 212211. Avmarkað pláss. Fyri at fáa sum mest burturúr workshoppuni mæla vit til, at hvør luttakandi fyritøka/stovnur hevur minst 2 persónar við. Tilmeldingarfreistin er 15. mai.

Atlanticon

Atlanticon Spf. · Bryggjubakki 4 · Postboks 263 · FO-110 Tórshavn · Tel. 319685
atlanticon@atlanticon.fo · www.atlanticon.fo



INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

norden
NORÐURLANDAHÚSIÐ

Innlendismálaráðið bjóðar saman við Norðurlendska Ráðharraráðnum til kunnandi tiltak um fyrireikingarnar til eina nýggja altjóða veðurlagsavtalu. Norðurlond taka virknan lut í fyrireikingunum. Settur er ein norðurlendskur COP15-bólkur, hvørs endamál er at rudda slóð fyri einari framsóknari veðurlagsavtalu í Keypmannahavn við Danmark sum verti. Her heima er landsstýrið í holt við at fyrireika tiltøk at minka um útlátið av veðurlagsgassum so til ber hjá Føroyum at taka undir við nýggju Keypmannahavnavtaluni.

INNBJÓÐING

ALMENNUR FUNDUR

um eina nýggja altjóða veðurlagsavtalu í Norðurlandahúsinum 19. mai kl. 13.00-16.00

SKRÁ

| | |
|---|---|
| **13.00-13.30** | Annika Olsen, landsstýriskvinna setir fundin og umrøður føroysku fyrireikingarnar til eina nýggja veðurlagsavtalu. |
| **13.30-14.15** | Harald Dovland, norska umhvørvisráðið og næstformaður í arbeiðsbólkinum hjá ST um framtíðar skyldur at minka um útlátið av veðurlagsgassum, umrøður støðuna í altjóða veðurlagssamráðingunum fram móti Keypmannahavn. |
| **14.15-14.40** | Steðgur. |
| **14.40-15.05** | Lars Hasselager Olsen frá danska Energistyrelsen og Camilla Mørk frá danska veðurlags- og orkumálaráðnum umrøða samráðingargongdina í IMO um útlát av veðurlagsgassum frá skipum. |
| **15.05-15.25** | Kate Sanderson, Uttanríkisráðið, umrøður tilgongdina til altjóða veðurlagsfundin í Keypmannahavn. |
| **15.25-15.40** | Kaj Leo Johannesen, løgmaður endar fundin. |
| **15.40-16.00** | Høvi er hjá fjølmiðlum at seta fyrilestrarhaldarum spurningar. |

*Tiltakið er ókeypis, men neyðugt er við tilmelding til kristvorp@imr.fo í seinasta lagi 18. mai á middegi.*